KRINGVARP FØROYA

# Ársfrásøgn 2015

Statusbókin

# Innihaldsyvirlit

Síða

UPPLÝSINGAR UM STOVNIN 3

ROKNSKAPARÁTEKNING LEIÐSLUNNAR 4

VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA 5

LEIÐSLUFRÁGREIÐING 6

NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR 10

RAKSTRARROKNSKAPUR 2015, KRINGVARP FØROYA 13

FÍGGJARSTØÐA TANN 31. DESEMBER 2015, KRINGVARP FØROYA 14

NOTUR 15

# Upplýsingar um stovnin

Kringvarp Føroya
Norðari Ringvegur
100 Tórshavn

Roknskaparár: 1. januar – 31. desember

## Kringvarpsstýri

Rúni Heinesen (formaður)
Hjalmar Hansen (næstformaður)
Kári Sólstein
Theodor E. D. Olsen
Katrin Petersen
Aibritt á Plógv
Gunvá við Keldu

## Stjórn

Dia Midjord
*stjóri*

## Grannskoðan

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f
Staravegur 17
FO-100 Tórshavn

KRINGVARP FØROYA

# Roknskaparátekning leiðslunnar

**Stýrið og stjórn hava í dag viðgjørt og viðtikið ársfrásøgnina fyri 2015 fyri Kringvarp Føroya.**

Ársroknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við ásetingarnar í "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o. t."

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin í øllum týðandi lutum er í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o. t.".

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Tórshavn hin 11. mai 2016

Stjórn:

Dia Midjord
*stjóri*

Stýrið:

Rúni Heinesen
*formaður*

Hjalmar Hansen
*næstformaður*

Kári Sólstein

Theodor E. D. Olsen

Katrin Petersen

Aibritt á Plógv

Gunvá við Keldu

KRINGVARP FØROYA

# Váttanir frá óheftum grannskoðara

*Til kringvarpsstýrið*

## Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Kringvarp Føroya fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2015 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.".

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, sum í øllum týðandi lutum er í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.". Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, herundir "Løgtingslóg nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.". Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at stovnurin kann gera ein ársroknskap, sum er rættur, tað vil siga uttan týðandi skeivleikar. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin fyri 2015 í øllum týðandi lutum er í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.".

## Ískoytisupplýsingar um viðurskifti í ársroknskapinum

Uttan at taka fyrivarni verður víst til notu 1 til ársroknskapin, har leiðslan greiðir frá týðandi óvissum í ársroknskapinum fyri 2015 knýttari at inntøkunum frá kringvarpsgjaldi.

## Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, hin 11. mai 2016

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Jóhannes Færø
*statsaut. revisor*

# Leiðslufrágreiðing

Kringvarp Føroya hevur í samsvari við kringvarpslógina skyldu til at kringvarpa sendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. Í programmvirkseminum skal Kringvarp Føroya leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.

Í fyrsta public service sáttmálanum millum Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið, galdandi fyri tíðarskeiðið 2011 til 2013, eru almennu skyldur Kringvarpsins nágreinaðar. Public Service sáttmálin er farin úr gildi, og miðað verður eftir at gera nýggjan sáttmála frá 1. januar 2017.

Árið í fjør eydnaðist væl hjá Kringvarpi Føroya. Árið var merkt av nógvum virksemi, m.a. vóru tvey val.

## Inntøkur

Inntøkurnar lækkaðu 6,3 mió.kr. í mun til árið fyri, úr góðum 64 mió.kr. niður í knappar 58 mió.kr.

| Inntøkur kr. | 2015 | 2014 | munur |
|---|---|---|---|
| Kringvarpsgjald | 48.197.148 | 47.078.366 | 1.118.782 |
| Kunngerðir og lýsingar | 6.299.798 | 5.870.299 | 429.499 |
| Spæl, netto inntøka | 3.157.252 | 10.602.328 | -7.445.076 |
| Annað | 260.093 | 625.528 | -365.435 |
| **Inntøkur tilsamans** | **57.914.291** | **64.176.511** | **-6.262.230** |

Spølini eru høvuðsorsøkin til lækkaðu inntøkurnar, og kemst hetta av, at inntøkurnar frá gekkaspælinum vóru óvanliga høgar í 2014. Afturat inntøkunum í árinum eru 2,3 mió.kr. av spæliinntøkum frá 2014 nýttar til at fíggja raksturin í 2015.

Samsvarandi roknskaparvegleiðingini um fremmanda fígging verða inntøkur frá eydnuspølum nú bert tiknar við í raksturin í tann mun, tær verða nýttar til at fíggja virksemi í árinum. Henda broytingin hevur virknað frá og við fíggjarárinum 2015.

## Útreiðslur

Framleiðandi og stuðlandi deildirnar vóru góðar 3,1 mió.kr. dýrari at reka enn árið fyri. Høvuðsorsøkir til øktu útreiðslurnar eru sáttmálabundnar lønarhækkingar og økt framleiðsla, m.a. framleiðsla av barna- og undirhaldssendingum umframt sendingar í sambandi við fólka- og løgtingsvalið.

Økta framleiðslan er í stóran mun fíggjað við spæliinntøkum frá 2014, sum vórðu støðlaðar í fíggjarstøðuni at nýta seinni til ávís endamál.

# Leiðslufrágreiðing

| Útreiðslur kr. | 2015 | 2014 | munur |
|---|---|---|---|
| Beinleiðis útreiðslur | | | |
| Aktuelt/Tíðindadeildin | 11.012.460 | 9.888.482 | 1.123.978 |
| Heimasíða | 1.023.744 | 907.883 | 115.861 |
| Mentan/Programdeildin | 11.678.898 | 11.027.691 | 651.207 |
| Tøknideildin (framleiðsla) | 9.509.044 | 8.193.723 | 1.315.321 |
| Beinleiðis útreiðslur tilsamans | 33.224.146 | 30.017.779 | 3.206.367 |
| Óbeinleiðis útreiðslur: | | | |
| Umsiting | 7.356.854 | 6.435.264 | 921.590 |
| Tøknideildin (ikki framleiðsla) | 11.588.667 | 13.128.850 | -1.540.183 |
| Rættindi | 4.005.986 | 3.476.679 | 529.307 |
| Óbeinleiðis útreiðslur tilsamans | 22.951.507 | 23.040.793 | -89.286 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **56.175.633** | **53.058.572** | **3.117.061** |

Ársúrslitið fyri 2015 er 0. Tá eru brúktar 2,3 mió. kr. av støðlaðum spæliinntøkum frá 2014, meðan 1,4 mió.kr. av spæliinntøkunum frá 2015 harafturímóti ikki eru tiknar við í raksturin, men støðlaðar í fíggjarstøðuni eftir reglunum um fremmanda fígging. Samanumtikið kann sigast, at úrslitið hjá Kringvarpi Føroya fyri 2015 var gott.

**Tvey rættarmál og tvey val**

Á sumri í 2014 stevndi Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, trimum kringvarpsfólkum; stjóra, tíðindaleiðara og journalist, fyri ærumeiðing. Kringvarpsfólkini vórðu 25. februar 2015 í Føroya rætti dømd at rinda dagbøtur, endurgjald og sakarmálskostnað.

Dómurin varð skotin inn fyri hægri rætt, og Eystari landsrættur feldi dóm 18. november 2015. Kringvarpsfólkini vórðu fríkend, og Jørgen Niclasen skuldi rinda sakarmálskostnaðin. Kringvarp Føroya fekk hjálp frá føroyskum advokati í Danmark til fyrra rættarmálið. Seinna rættarmálið førdi danskur advokatur við sergrein í miðlaløgfrøði.

Virksemið hjá Kringvarpi Føroya í fjør fevndi eisini um tvey val. Fólkatingsval var 18. juni, og løgtingsval var 1. september. Kringvarp Føroya gjørdi nógv burtur úr valunum, men peningurin varð settur av til endamálið, so sjálvt um Kringvarp Føroya spenti bogan, ávirkaðu valini lítið og einki vanliga raksturin.

**Fremmand fígging**

Spæli-inntøkurnar hjá Kringvarpi Føroya kunnu sambært Fíggjarmálaráðnum samanberast við fremmanda fígging, sambært §13, stk. 5 í roknskaparkunngerðini. Skipanin er ein restfígging, sum tó ikki kann samanberast við heimildina at flyta avlop tvørtur um ár.

Tað hevur stóran týdning fyri virksemið hjá Kringvarpi Føroya, at stovnurin hevur fingið hesa heimild. Nú ber til at leggja til síðis og í størri mun leggja til rættis, so at pengarnir verða brúktir á skilabesta hátt.

# Leiðslufrágreiðing

**SavnsGull**
Arbeiðið at talgilda bandasøvnini hjá Kringvarpi Føroya gongst sum ætlað. Verkætlanin við heitinum SavnsGull, sum fer fram í samstarvi við Søvn Landsins, fær 900.000 krónur á fíggjarlógini. Játtanin er higartil brúkt til at talgilda útvarpsbond og pappírstíðindi.

Royndir eru eisini gjørdar at talgilda sjónvarpsbond, men serligur førleiki og útgerð krevst til henda partin, tí elstu sjónvarpsbondini eru rættiliga illa farin. Arbeitt verður áhaldandi við at fáa økta játtan til verkætlanina, so at eisini farast kann undir at talgilda sjónvarpspartin.

**Framtíðin**
Tað gongur væl í Kringvarpi Føroya. Varni og neyvi fíggjarpolitikkurin seinastu árini hevur verið við til at tryggja, at Kringvarp Føroya gongur ljósari tíðum á møti. Kringvarpsgjaldið verður nú kravt inn um skattin, og tann broytingin hevur við sær, at Kringvarp Føroya hvílir á einum tryggari grundarlag.

Næsta stig er at fáa óvissuna um spæliinntøkurnar burtur. Ætlanin er at spara saman pening frá eydnuspølunum, og ikki brúka peningin fyrr enn árið eftir. Á henda hátt veit Kringvarp Føroya neyvt, hvørjar inntøkur eru tøkar til virksemið í árinum.

2016 verður helst eitt hendingaríkt ár, tí arbeitt verður við at uppstiga Kringvarp Føroya. Gongst sum ætlað, fer stovnurin í 2016 at framleiða og senda tilfar í HD-góðsku til føroyingar.

**Nýggj innkrevjing**
Samgongan, sum tók við á heysti 2015, ynskti, at kringvarpsgjaldið frá 1. januar 2016 skuldi krevjast inn um skattin, og at TAKS skuldi standa fyri innkrevjingini.

Nýggja skipanin ásetir, at fólk millum 24 og 66 ár rinda 150 kr. um mánaðin, og tey, sum eru 67 ár og eldri, rinda 50 kr. um mánaðin. Lands- og kommunalir stovnar, feløg v.m. rinda árligt gjald, sum verður í mun til lønarútreiðslurnar í árinum fyri innkrevjingina.

Samstundis, sum myndugleikarnir arbeiddu við at broyta innkrevjingarskipanina, kom glið á arbeiðið hjá Kringvarpi Føroya at bøta um innkrevjingina. Arbeiðið hevur verið drúgt, og stutt fyri árslok fekk Kringvarp Føroya atgongd til almennu skránna hjá Landsfólkayvirlitinum.

Nýggju upplýsingarnar høvdu við sær, at Kringvarp Føroya kundi senda væl fleiri rokningar fyri kringvarpsgjald í seinnu hálvu av 2015.

**Út- og umbygging**
Í november 2014 varð hakin stungin í svørðin norðanfyri, og fyrsti bøkkur í ætlanini at út- og umbyggja kringvarpshúsini varð loystur. Arbeitt var við framleiðslubygninginum í alt 2015, og bygningurin er um at verða liðugur.

# Leiðslufrágreiðing

Sjálvt um Landsverk ikki handar bygningin fyrr enn øll út- og umbyggingin er liðug, fær Kringvarp Føroya brúksrættin ein av fyrstu døgunum. Tað merkir, at Kringvarp Føroya kann byrja við tøkniligum innleggingum og annars fáa neyðuga útgerð og møblar til vega.

Landsverk handar Kringvarpi Føroya endaliga bygningin, tá bæði tey fyrstu byggistigini eru liðug. Arbeiðið at gera 2. byggistig, sum fevnir um eina umsitingarlon og eina forhøll frammanfyri, skal eftir ætlan verða liðugt í 2016. Løgtingið samtykti verklagslógina at gera liðugt 2. byggistig fyrst í desember 2015. Stutt fyri jól varð fíggjarlógin 2016 samtykt, har íløgan ella játtanin til Kringvarp Føroya á 10,3 mió. kr. er niðurfeld.

Tað er byggifelagið ÁTS við Karstin Vang í Kaldbak, sum stendur fyri 2. byggistigi.

# Nýttur roknskaparháttur

### Inngangur

Ársfrásøgnin fyri Kringvarp Føroya fyri 2015 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir somu roknskaparreglum sum undanfarna ár, tó eru spæliinntøkurnar viðgjørdar sum fremmand fígging, sambært § 13, stk. 5 í roknskaparkunngerðini.

## Rakstrarroknskapurin

### Inntøkur og útreiðslur

Inntøkur og útreiðslur, sum stava frá vørum og tænastuveitingum, verða skrásettar, tá ið tær eru latnar.

Í teimum førum, tá útreiðslur ella inntøkur ikki stava frá vørum og tænastuveitingum, verða tær skrásettar, so skjótt upphæddin kann gerast upp, og í seinasta lagi, tá ið goldið verður. Ein upphædd kann gerast upp, um eitt rættarligt krav eftir eini væl greinaðari upphædd kann gerast galdandi. Um eitt munandi krav, sum er til eitt ávíst fíggjarár, ikki kann gerast endaliga upp, áðrenn roknskaparárið er lokið, verður upphæddin skrásett á einari rakstrarkontu í roknskapinum fyri tað fíggjarárið, grundað á eina meting, soleiðis at upphæddin verður rættað í tí fíggjarári, tá ið kravið endaliga kann verða gjørt upp.

### Inntøkur av eydnuspølum

Skipanin við fremmandu fíggingini av spæliinntøkum hjá Kringvarpinum virkar á tann hátt, at tað sum er eftir at fíggja – tá ið hædd er tikin fyri vanligu inntøkunum frá kringvarpsgjaldi kunngerðum o.ø., og møguligari játtan – verður fíggjað av fremmandu fíggingini, um upphædd er á kontuni, sum verður tikin við á fíggjarstøðuni undir skuld. Uppsparda upphæddin til fremmanda fígging kann verða samansavnað eftir einum ella fleiri árum, og kann nýtast eftir einum ella fleiri árum.

Fremmanda fíggingin er tískil ein restfígging, sum er treytað av tveimum viðurskiftum:

1. At fígging vantar í til raksturin av Kringvarpinum, tá ið ársins kringvarpsgjald, aðrar inntøkur og møgulig játtan eru nýttar. Í hesum liggur eisini, at vanligu inntøkurnar og játtan ikki kunnu samansavnast á kontu fyri fremmandari fígging á fíggjarstøðuni.

2. At spæliinntøkur eru tøkar á fíggjarstøðuni, t.v.s. at tað er ein uppspard upphædd á fíggjarstøðuni til fremmanda fígging. Kringvarpið má tí taka við, hvussu stórar samansavnaðu tøku spæliinntøkurnar eru og væntandi verða, tá ið fleirársætlanir fyri virksemið verða lagdar. Tað kann ongantíð verða flutt meira til raksturin av kontu fyri fremmandari fígging, enn upphæddin á kontuni, t.v.s. at kontan fyri fremmanda fígging ongantíð kann koma í trot.

# Nýttur roknskaparháttur

## Fíggjarstøðan

### Materiell støðisogn

Íløgur og størri viðlíkahald, sum er ein betring av verandi støðisogn, verður eins og vanligt viðlíkahald útreiðsluført í rakstrarroknskapinum.

Materiell støðisogn, hvørs keypsvirði er yvir 75 tkr., verður skrásett sum materiell støðisogn og ein samsvarandi mótkonta verður skrásett beinleiðis undir eginognini. Materiella støðisognin verður upptikin til kostprís við frádrátti av avskrivingum. Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði. Avskrivingarnar hava onga ávirkan á raksturin, við tað at talan er um tekniskar avskrivingar.

Niður- ella uppskrivingar av skrásettari materiellari støðisogn verða skrásettar, um tað kann staðfestast, at roknskaparliga virðisbroytingin á støðisognini er varandi. Talan er um eina roknskaparliga skráseting, sum ikki ávirkar rakstrarroknskapin.

### Goymsla

Eins og undanfarin ár, er virðið á vørugoymsluni ikki tikið við á goymslukontu í fíggjarstøðuni, við tað at játtanarheimild ikki er til tess.

### Vøru- og tænastuáogn

Vøru- og tænastuáogn verður virðisásett til amoritseraðan kostprís, har hædd verður tikin fyri væntaðum tapum.

### Onnur áogn

Onnur áogn fevnir um áogn hjá starvsfólkum og meirvirðisgjald.

### Millumrokningar

Stuttfreistað skuld hjá Kringvarp Føroya til Gjaldstovuna fevnir um millumrokning vegna peningaflytingar, sum Gjaldstovan hevur gjørt vegna Kringvarp Føroya.

### Onnur skuld

Onnur skuld verður virðissett til nettorealisatiónsvirði og fevnir um skyldugar vinningar í sambandi við spøl, afturhildnan skatt í sambandi við spøl, skyldugan starvsfólkakostnað og annan skyldugan kostnað.

# Nýttur roknskaparháttur

**Støðlað avlop**
Støðlað avlop verður virðissett til nettorealisatiónsvirði og fevnir um avlop frá eydnuspølum.

Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan meta, at spæliinntøkurnar hjá Kringvarpi Føroya kunnu sammetast við fremmanda fígging, sambært §13, stk. 5 í roknskaparkunngerðini:

> Inntøkur av verkætlanum o. t. - sum rætturin til at taka ímóti, er treytaður av, at ávíst virksemi verður framt - verða tiknar við sum inntøka so hvørt, sum peningurin verður nýttur til ætlaða endamálið.

Uppspard upphædd frá fremmandari fígging kann verða samansavnað eftir einum ella fleiri árum, og kann nýtast eftir einum ella fleiri árum.

**Avsettar skyldur**

Avsettar skyldur verða tiknar við í ársroknskapin, tá ið ein bindandi hending er farin fram, og skyldan er sannlík, men óvist er, nær upphæddin fellur til gjaldingar, ella hvussu stór upphæddin er. Nýtslan av avsettum skyldum verður javnað, tá ið skyldan kann gerast endaliga upp, og skyldan verður útint.

Samsvarandi nýttum roknskaparhátti í landsroknskapinum verða skyldugar starvsfólkaskyldur ikki tiknar við í ársroknskapin uttan so, at tað ikki er óvist, nær upphæddin fellur til gjaldingar og hvussu stór upphæddin er. Skyldug avspáking verður tikin við sum ein skylda undir aðrari skuld.

# Rakstrarroknskapur 2015, Kringvarp Føroya

## KRINGVARP FØROYA

| Nota | | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| 2 | Inntøkur | 57.914.291 | 64.176.511 |
| 3 | Framleiðandi deildir | -33.224.146 | -30.017.779 |
| 4 | Stuðlandi deildir | -18.945.521 | -19.564.114 |
| 5 | Annar kostnaður | -4.005.986 | -3.476.679 |
| | **Úrslit áðrenn rentur, avskrivingar og íløgur** | **1.738.638** | **11.117.939** |
| | Íløgur og størri viðlíkahald | -3.367.134 | -3.722.140 |
| | Avskrivingar og avsetingar av skuldarum | -695.779 | -399.668 |
| | **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **-2.324.275** | **6.996.131** |
| | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 6.442 | 54.802 |
| | Aðrir fíggarligir kostnaðir | -6.141 | -6.830 |
| | **Úrslit áðrenn støðling av avlopi** | **-2.323.974** | **7.044.103** |
| | Støðlað avlop frá eydnuspølum | 0 | -7.044.103 |
| | Afturført støðlað avlop frá 2014 | 2.323.974 | 0 |
| | **Ársúrslit** | **0** | **0** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2015, Kringvarp Føroya

**KRINGVARP FØROYA**

| Nota | OGN | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| | Grundøki | 3.183.768 | 3.183.768 |
| | Bygningur | 13.243.168 | 13.243.168 |
| | Akfør | 131.236 | 313.517 |
| | **Materiel støðisogn til samans** | **16.558.172** | **16.740.453** |
| | Millumrokning við Gjaldstovuna | 3.321.469 | 0 |
| 6 | Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar | 2.380.672 | 1.992.901 |
| 7 | Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald | 3.262.178 | 2.633.013 |
| 8 | Onnur áogn | 693.988 | 367.978 |
| | **Áogn til samans** | **9.658.307** | **4.993.892** |
| 9 | Tøkur peningur | 919.131 | 22.817.899 |
| | **Ogn í umferð til samans** | **10.577.438** | **27.811.791** |
| | **Ogn til samans** | **27.135.610** | **44.552.244** |

| Nota | SKYLDUR | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| | Eginogn við ársbyrjan | -4.340.040 | -4.340.040 |
| | Mótkonta, bygningur | 13.243.168 | 13.243.168 |
| | Mótkonta, onnur materiel støðisogn | 3.315.004 | 3.497.285 |
| | Mótkonta, upphædd á StRk. 0360 | 4.340.040 | 4.340.040 |
| | Ársúrslit áðrenn støðling | -2.323.974 | 7.044.103 |
| | Flutt til/frá Strk. 0881 | 2.323.974 | -7.044.103 |
| | **Eginogn til samans** | **16.558.172** | **16.740.453** |
| | **Stuttfreistað skuld** | | |
| | Millumrokning við Gjaldstovuna | 0 | 17.752.999 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 0 | 0 |
| 10 | Onnur skuld | 4.424.195 | 3.014.689 |
| 11 | Fremmand fígging | 6.153.243 | 7.044.103 |
| | **Stuttfreistað skuld til samans** | **10.577.438** | **27.811.791** |
| | **Skyldur til samans** | **27.135.610** | **44.552.244** |

Týðandi roknskaparligar óvissur og viðurskifti (nota 1)

Ognir, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuni (nota 12)

Skyldur, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuni (nota 13)

# Notur

## 1 Týðandi roknskaparligar óvissur og viðurskifti

**Inntøkugrundarlagið viðvíkjandi kringvarpsgjaldi**
Til 1. januar 2016 hevur Kringvarp Føroya havt skyldu at gera og dagføra eina skrá við neyðugum upplýsingum um húski, arbeiðspláss og høli, sum koma undir gjaldskyldu. Eingin av almennu skráunum yvir húski, arbeiðspláss o.a. innihalda allar tær upplýsingar, sum Kringvarp Føroya hevur havt tørv á fyri at krevja kringvarpsgjaldið rætt inn frá øllum.

Kringvarpsgjaldið hevur tí verið tungt at umsita. Nógv tíð er farin til at útvega neyðugar upplýsingar fyri at gera av, um borgarar ella virkir høvdu gjaldskyldu. Talan hevur verið um upplýsingar frá bæði borgarum og myndugleikum, og mangan skuldu ítøkiligar metingar gerast.

Við einari ófullfíggjaðari skrá hevur óvissa valdað um veruliga inntøkugrundarlagið hjá Kringvarpi Føroya. Óvissan valdaði framvegis í 2015, tó batnaðu viðurskiftini munandi, tá ið umsitingin seint á heysti 2015 fekk atgongd til skránna hjá Landsfólkayvirlitinum.

Eftir 1. januar 2016 er skipanin við kringvarpsgjaldinum avgerandi broytt. Gjaldskyldan er tengd at persónum, virkjum, stovnum v.m., og TAKS krevur kringvarpsgjaldið inn vegna Kringvarp Føroya.

# Notur

2 **Inntøkur**

| Inntøkur | 2015 | 2014 |
|---|---|---|
| Kringvarpsgjald | 48.197.148 | 47.078.366 |
| Útvarpskunngerðir og –lýsingar | 4.840.400 | 4.706.652 |
| Sjónvarpslýsingar og ískoytisveitingar | 1.459.398 | 1.163.647 |
| V4-spælið, netto | 202.518 | 374.914 |
| Gekkaspælið, netto | 2.954.734 | 10.227.414 |
| Aðrar inntøkur | 260.093 | 625.518 |
| **Inntøkur til samans** | **57.914.291** | **64.176.511** |

| V4-spælið, netto | 2015 | 2014 |
|---|---|---|
| Inntøkur | 527.325 | 859.392 |
| Lønir, samsýningar og lønartengdar útreiðslur | -175.954 | -179.154 |
| Aðrar útreiðslur | -148.853 | -305.324 |
| **V4-spælið, tikið við sum rakstrarinntøka í árinum** | **202.518** | **374.914** |

| Gekkaspælið, netto | 2015 | 2014 |
|---|---|---|
| Inntøkur | 10.525.440 | 19.143.840 |
| Lønir, samsýningar og lønartengdar útreiðslur | -446.735 | -425.547 |
| Aðrar útreiðslur | -5.690.857 | -8.490.879 |
| **Nettoúrslit í árinum** | **4.387.848** | **10.227.414** |
| Partur av inntøku í árinum, sum er støðlað á kontu fyri fremmandari fígging | -1.433.114 | 0 |
| **Gekkaspælið, tikið við sum rakstrarinntøka í árinum** | **2.954.743** | **10.227.414** |

# Notur

3 **Framleiðandi deildir**

| | 2015 | 2014 |
|---|---|---|
| **Aktuelt/Tíðindadeildin:** | | |
| Lønir og samsýningar | 10.306.175 | 9.453.451 |
| Vørur og tænastur | 706.285 | 435.031 |
| **Aktuelt/Tíðindadeildin til samans** | 11.012.460 | 9.888.482 |
| | | |
| **Heimasíða:** | | |
| Lønir og samsýningar | 991.044 | 907.883 |
| Vørur og tænastur | 32.700 | 0 |
| **Heimasíða til samans** | 1.023.744 | 907.883 |
| | | |
| **Mentan/Programmdeildin:** | | |
| Lønir og samsýningar | 10.108.101 | 9.889.492 |
| Vørur og tænastur | 1.570.797 | 1.138.199 |
| **Mentan/Programmdeildin til samans** | 11.678.898 | 11.027.691 |
| | | |
| **Tøknideildin (framleiðsluparturin):** | | |
| Lønir og samsýningar | 8.947.592 | 7.656.829 |
| Vørur og tænastur | 561.452 | 536.894 |
| **Tøknideildin (framleiðslupartur) til samans** | 9.509.044 | 8.193.723 |
| | | |
| **Framleiðandi deildir til samans** | **33.224.146** | **30.017.779** |

# Notur

| 4 Stuðlandi deildir | 2015 | 2014 |
|---|---|---|
| **Umsitingin:** | | |
| Lønir | 4.797.981 | 4.499.785 |
| Vørur og tænastur | 2.558.873 | 1.935.479 |
| Umsitingin til samans | 7.356.854 | 6.435.264 |
| **Tøkni deildin (ikki framleiðslupartur):** | | |
| Lønir og samsýningar | 4.715.848 | 5.823.916 |
| Vørur og tænastur | 2.791.526 | 2.897.207 |
| Samskiftiskostnaður | 1.042.237 | 1.112.808 |
| Húsakostnaður | 2.612.668 | 2.840.165 |
| Rakstur av akførum | 426.388 | 454.754 |
| Tøkni deildin til samans | 11.588.667 | 13.128.850 |
| **Stuðlandi deildir til samans** | **18.945.521** | **19.564.114** |

| 5 Annar kostnaður | 2015 | 2014 |
|---|---|---|
| Kostnaður fyri rættindi | 4.005.986 | 3.476.679 |
| Ískoyti til teknmálstulking | 0 | 0 |
| **Annar kostnaður til samans** | **4.005.986** | **3.476.679** |

| 6 Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar | 2015 | 2014 |
|---|---|---|
| Áogn, brutto | 3.083.914 | 2.807.627 |
| Avsett móti væntaðum tapi | -703.242 | -814.726 |
| **Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar til samans** | **2.380.672** | **1.992.901** |

# Notur

| 7 | Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| | Áogn, brutto | 8.262.178 | 7.333.013 |
| | Avsett móti væntaðum tapi | -5.000.000 | -4.700.000 |
| | **Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald til samans** | **3.262.178** | **2.633.013** |

| 8 | Onnur áogn | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| | Meirvirðisgjald | 0 | 214.411 |
| | Depositum | 76.082 | 76.082 |
| | Ferðaforskot | 0 | 58.274 |
| | Tíðaravmarkingar og onnur áogn | 617.906 | 19.211 |
| | **Onnur áogn til samans** | **693.988** | **367.978** |

| 9 | Tøkur peningur | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| | BankNordik | 442.087 | 14.506.202 |
| | Eik Banki | 270.269 | 5.008.518 |
| | Norðoya Sparikassi | 18.553 | 1.719.561 |
| | Suðuroyar Sparikassi | 186.177 | 1.581.418 |
| | Kassapeningur | 2.045 | 2.200 |
| | **Tøkur peningur til samans** | **919.131** | **22.817.899** |

| 10 | Onnur skuld | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| | Meirvirðisgjald | 173.025 | 0 |
| | Skyldug avspáking | 989.600 | 718.400 |
| | Skyldugt frítíðarískoyti | 331.000 | 313.000 |
| | Skyldur í sambandi við eydnuspøl | 1.943.739 | 1.475.543 |
| | Upphavsrættargrunnur | 109.742 | 87.927 |
| | Tíðaravmarkingar | 877.089 | 419.819 |
| | **Onnur skuld til samans** | **4.424.195** | **3.014.689** |

# Notur

11

| Fremmand fígging | | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Støðlað við ársbyrjan | | 7.044.103 | 0 |
| Tilgongd í árinum | | 4.590.366 | 7.044.103 |
| Frágongd í árinum | | -5.481.226 | 0 |
| **Støðlað/fremmand fígging tilsamans** | | **6.153.243** | **7.044.103** |
| **Tilgongd í árinum** | | | |
| Inntøkur V4-spælið, netto | | 202.518 | 0 |
| Inntøkur gekka-spælið, netto | | 4.387.848 | 7.044.103 |
| **Tilgongd tilsamans** | | **4.590.366** | **7.044.103** |
| **Frágongd í árinum** | | | |
| Flutt til rakstur, restfígging | | 3.157.252 | 0 |
| **Brúkt av avlopi 2014:** | | | |
| Aktuelt og kjak | 750.000 | | 0 |
| Børn og ung | 337.074 | | 0 |
| Undirhald | 282.797 | | 0 |
| Útgerð, tøkni og heimasíða | 420.000 | | 0 |
| Onnur endamál | 534.103 | 2.323.974 | 0 |
| **Frágongd tilsamans** | | **5.481.226** | **0** |

| Sundurgreinaðar saldur | Eydnuspøl 2014 | Eydnuspøl seinni ár | Salda við ársenda 2015 |
|---|---|---|---|
| Salda við ársbyrjan 2015 | 7.044.103 | 0 | 7.044.103 |
| Tilgongd í 2015 | 0 | 4.590.366 | 4.590.366 |
| Frágongd í 2015 | -2.323.974 | -3.157.252 | -5.481.226 |
| **Salda við ársenda 2015** | **4.720.129** | **1.433.114** | **6.153.243** |

Inntøkur frá eydnuspølum vórðu á fyrsta sinni støðlaðar sum fremmand fígging í fíggjarárinum 2014. Í roknskapinum fyri 2014 varð støðlaða nettoupphæddin, 7.044 tkr., tikin við sum inntøka í rakstrinum, og flutt á kontuna fyri fremmanda fígging í fíggjarstøðuni sum eitt avlop. Frá og við 2015 verða inntøkur frá eydnuspølum bert inntøkuførdar í rakstrinum í tann mun, tørvur er á tí, sum restfígging. Upphæddin viðvíkjandi 2014, sum longu er inntøkuførd eina ferð, verður afturførd so hvørt, sum brúkt verður av henni, og hon verður skrásett í rakstrinum sum sjálvstøðugur postur áðrenn ársúrslitið.

# Notur

## 12 Ognir, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuna

Bygningurin og akfør eru skrásett sum materiell støðisogn í fíggjarstøðuni.

Tilgongdir viðvíkjandi materiellari støðisogn, sum eru førdar yvir raksturin seinastu 4-5 árini, eru ikki tiknar við í fíggjarstøðuna. Tó eru 5,0 mió.kr. viðvíkjandi einari stórari umbygging í 2013 tiknar við í fíggjarstøðuna í ársroknskapinum, men ikki í fíggjarstøðuna í Búskaparskipan Landsins.

Arbeiðið, at gera materiella støðisogn upp, er í gongd. Tá ið uppgerðin er gjørd, verða allar ognir, ið hava virðið omanfyri 75 tkr., tiknar við í fíggjarstøðuna í Búskaparskipan Landsins.

Kringvarp Føroya hevur verið partur í einum sakarmáli. Tveir dómar vórðu sagdir í málinum í 2015. Sambært endaliga dóminum hjá Eystara landsrætti skal mótparturin rinda Kringvarpi Føroya 0,25 mió.kr. fyri sakarmálskostnað. Mótparturin hevur kært tann partin av dóminum, sum snýr seg um endurgjaldsupphæddina, men kærunevndin hevur ikki tikið støðu til kæruna enn. Grundað á óvissu um upphæddina, er endurgjaldsupphæddin ikki tikin við í fíggjarstøðuna, sum ein áogn.

## 13 Skyldur, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuna

Skyldug restferia frá innvinningarárinum 2014/2015 er við árslok 2015 gjørd upp til 0,8 mió.kr. (2013/2014: 0,6 mió.kr.).

Harumframt hava starvsfólk í roknskaparárinum 2015 vunnið rætt til feriu at halda í frítíðarárinum 2016/2017. Av hesari skyldu eru 0,3 mió.kr. tiknar við í fíggjarstøðuna, svarandi til skyldugt frítíðarískoyti, ið er innvunnið í tíðarskeiðinum 1. apríl – 31. desember 2015.